# Stýrisskipanarlógin og heitini fyri landsstýrismann, tingmann v.m.

Eg var innkallaður í dag at tosa um ætlaðu broytingina av tingskipanini og stýrisskipanarlógini viðvíkjandi heitum sum landsstýrismaður, tingmaður v.m. Eg skal her taka saman um míni sjónarmið, serliga viðv. seinna uppskotinum.

Stýrisskipanarlógin sigur ikki eftir míni tulking, at føroyskir ministarar og parlamentarikarar *skulu* kallast landsstýrismenn og løgtingsmenn. Heitið landsstýrismaður og løgtingsmaður liggur meira sum ein faktisk fortreyt, ið støðið verður tikið í, og sum lógin er skrivað "við rygginum ímóti", heldur enn at heitini eru sjálvstøðugt evni fyri regulering.

Alt lógarmál er ikki eins viðkomandi fyri ta lógarreglu ella tann lógarnorm, sum ein lógartekstur ber í sær. Ein munur er á, at okkurt er *nevnt* í eini lóg, og at hetta er *regulerað* í lógini. Skiljast má v.ø.o. millum part av lógarmáli, ið samstundis er partur av lógarregluni, og tað lógarmál, ið ikki beinleiðis er partur av lógarregluni. Vit kenna tað t.d. frá revsingini "hefti", sum er nevnt í § 71, stk. 5, í grundlógini, men sum nú er avtikin uttan grundlógarbroyting og júst av tí orsøk, at hesin partur av málinum í grundlógini tekur avsett í eini fortreyt, sum var veruleiki, tá lógin varð skrivað, uttan at fortreytin sjálv var partur av rættarnorminum (rættarregluni).

Á sama hátt ganga heitini løgmaður, landsstýrismaður og løgtingsmaður aftur til stýrisskipanina frá 1948, uttan at stýrisskipanarlógin frá 1948, ella tann seinna frá 1995, sjálvstøðugt hava regulerað, at heitini skulu vera kallkyn.

Spurningurin fekk ikki sjálvstøðuga viðgerð í lóggávuprosessini, tá stýrisskipanarlógin frá 1995 bleiv viðgjørd og samtykt. Spurningurin varð rætt nokk nevndur í álitinum um stýrisskipanarviðurskifti Føroya frá 1994, s. 170. Helst ætlaðu teir, sum skrivaðu álitið – ella onkur teirra – at heitið "maður" í ministari og parlamentarikari skuldi vera bindandi partur av stýrisskipanarlógini. Kortini kann rættarkeldutýdningurin av einum embætismannaáliti ikki samanberast við forarbeiði frá lóggávuprosessini sjálvari.

Heimastýrislógin sjálv gevur eisini ábending um, at politisku heitini ikki sjálvi vóru evni fyri regulering, tá verandi heimastýri byrjaði, tí heimastýrislógin í § 4 kallar verandi løgmann fyri landsstýrisins formann. Heldur ikki noyðast vit longur enn til ríkisgrundlógina, sum kallar ríkisovastan kong, hóast sama rolla eisini kann vera sett av eini kvinnu, tá kallað drotning.

Viðvíkjandi løgmanni, so er tað heitið meira ein symbolsk enn ein innihaldslig gerð, ið bindir aftur í eina gamla føroyska politiska og løgsøguliga skipan, sum innihaldsliga neyvan er tað mest upplagda heitið til ein modernaðan premierministara ella forsætisráðharra. Spurningurin er tískil, um kynsjavnstøða á júst tí økinum gevur so góða meining, tí løgkvinna er ikki ein gomul føroyskt institutión, og tískil verður (symbolska) meiningin harvið burtur ella grundleggjandi broytt.

Eisini eigur ein, ið vil broyta eina so grundleggjandi og tignarliga lóg sum stýrisskipanarlógina, at hava umhugsni fyri stíli og fagurfrøði, soleiðis, at hendan broytingin, um hon verður framd, ikki stendur sum ein long og knortlut uppreksan sum § 1a, men verður sett aftarliga í lógini, har tekniskar ásetingar, gildiskomuásetingar v.m. vanlig standa.

Samanumtikið er metingin, at Løgtingsmál 069/2022 við uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya er óneyðugt, og at tann broytingin, sum ætlast framd, kann gerast í løgtingsmáli 070/2022 við uppskot til broyting í tingskipanini.

17/4-23

Bárður Larsen, løgfrøðingur